## Lærlingur til fotodeildina

Vit sóknast eftir einum lærlingi til fotodeild okkara at byrja sum skjótast. Tú kemur m.a. at arbeiða á okkara nútímans foto-laboratorii og taka tær av alskyns uppgávum innan foto og ta spennandi nýggju "digitalu" verðina.



Hevur tú kunnleika til fotoarbeiði og telduførleika, er tað ein fyrimunur.
Lærutíðin er 3 ár og ein treyt er, at tú hevur FHS-prógv el. líkn. Í lærutíðini verður tú send/ur niður á 14 daga skeið/skúla 2-3 ferðir; og annars upplærd/ur av serfrøðingum innan foto, ið 3-arin hevur vitjan av av og á. Tú kemur at starvast saman við einum ungum dynamiskum liði. Umframt fotodeildina hevur 3-arin eina fløgudeild, eina tøknideild og eina deild við prýðislutum. Tilsamans starvast uml. 12 fólk í 3-aranum, undir leiðslu av okkara stjóra Høgna Zachariasen.

Vilt tú hava meiri at vita um starvið, ert tú vælkomin at ringja til Gissur, tel 353534.

Skrivlig umsókn verur at senda sum skjótast til:

3arin

*att. Gissur Patursson*
*SMS · Postboks 1057 · FO-110 Tórshavn*

## 1. hjálp - Víðka skeið 20 tímar

fyri tey, ið hava grundskeið ikki eldri enn 3 ár, byrjar 12. apríl.

Tilmelding beinanveg á tlf. 319630 ella teldupost: redcross@redcross.fo

**Reyði Krossur Føroya**



## Handverkarir

Søkt verður eftir dugnaligum handverkarum at arbeiða innan HVS og smiðjuyrki.

demich **Ring á tlf. 21 10 71**

## Ársaðalfundur/ hugnakvøld

verður í Veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum 10. apríl kl. 19.00. Skrá sambært lóg felagsins.

Eftir aðalfundin verður fyrilestur, har Inge Lise Sørensen fys., greiðir frá heilsugóðari lívsførslu.

Ad Libitum og Robert Mc. Birnie spæla og syngja.

GEVIÐ BLÓÐ

**Felagið Blóðgevi**

### Frá Tórshavnar Bátafelag

Aðalfundur verður tann 22. apríl 2002 kl. 19.00 í hølum felagsins. Skrá smbr. lógini. Mál, ið ynskjast viðgjørd, skulu vera nevndini í hendi 8 dagar áðrenn fundin. Uppskot er um lógarbroyting.

**Tórshavnar Bátafelag**

## Hús á Tinghúsvegnum



Eini eldri sethús á Tinghúsvegnum 38 eru til sølu.

Húsini eru í 3 hæddum og innrættaði soleiðis.

Loft: 4 kømur, wc, men eingin brúsa ella bað, gongd
Stovuhædd: Gongd, køkur, spísikamar, kamar, 2 smáar stovur
Kjallari: Ráur, men partvíst innrættaður.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Advokatskrivstovuna, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, att. Óla Jákup Kristoffersen, e-mail ojk@advlaw ella Heidi Hammer, e-mail hjh@advlaw.fo

**Advokatskrivstovan**
Fr. Petersensgøtu 9
100 Tórshavn · Tlf. 311145
att.: Fríða Patursson, adv.

### Ársaðalfundur Suðuroyar Sparikassa

verður mánadagin 22. apríl 2002 kl. 18.00 á Hotel Bakkanum við hesi dagsskrá:

1. Val av fundarstjóra
2. Frágreiðing umsjónarráðsins um virki sparikassans í farna ári
3. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar
4. Val av limum í umsjónarráðið
5. Val av grannskoðara
6. Uppskot frá stjórn, umsjónarráði ella umboðsráðslimum
7. Ymiskt

**Umsjónarráðið**

**Norðurlandahúsið í Føroyum**

*Sí SVF tekstvarp s. 650*

www.johandahl.net



**Johan Dahl**
Valevni Sambandsfloksins í Suðuroy

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3337
Navn: Sp/f LJL
Adressa: 690 Oyndarfjørður
Kommuna: Oyndarfjarðar Kommuna
Stovningardato: 25.03.2002
Viðtøkudato: 25.03.2002
Kapitalur: Kr. 103.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kr. 103.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Jørmund L. Juul, 690 Oyndarfjørður.
Stjórn: Jørmund L. Juul, 690 Oyndarfjørður.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: : Sp/f Grannskoðarastovan á Skála, 480 Skáli.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka handverk, ídnað, handil, ráðgevingarvirksemi o.a. í hesum sambandi.
Felagið er stovnað við umskipan av virkið eftir umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 4. apríl 2002

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 1541, Sp/f Rættarhamar, 490 Strendur.

Viðtøkur broyttar: 19.03.2002.
Nýggjur heimstaður: Tórshavnar Kommuna
Nýggj adressa: Postbox 1249, 110 Tórshavn
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Helgi Arnbjørn Fossádal, Stoffalág 45, 100 Tórshavn.
Innkomin sum stjóri: Bjarti Mohr, V. U. Hammerhaimbsgøta 36, 100 Tórshavn.
Grannskoðari: Farin frá sum grannskoðari: Sp/f Grannskoðarastovan á Skála, 480 Skála.
Innkomin sum grannskoðari: P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 4. apríl 2002

Kristin Balle



demich
Stiðjagøta 2 – Postboks 378
FO-110 Tórshavn
Tlf.: 311071 – fax: 310460
e-mail: demich@demich.fo

## Lærlingur

### Hevur tú hug at royna teg?

Vegna økjandi virksemið, søkja vit eftir lærlingi til handil okkara, læran kemur at umfata samskifti við viðskiftafólk, útkoyring og bilegging av vørum o.a.

Væntað verður at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt, er fyrikomandi og hevur hug at veita viðskiftafólki okkara eina góða tænastu.

Fyri at koma í læru, er tað ein treyt, at tú hevur koyrikort og FHS ella HH.

Skrivlig umsókn verður at senda til okkum í seinasta lagi 12. apríl 2002.

Gøtu Kommuna



## Gøtu kommuna søkir

1 Dagrøktara, at byrja skjótast tilber.
1 Sjúkraavloysara fyri dagrøktararnar, at byrja skjótast tilber.

Dagrøktarheimið skal vera innrætta barnavinarligt, har rúm er til børnini at spæla í og hóskandi trygt spæliøkið uttanfyri.

Í skipanini er bert ein dagrøktari í løtuni. Ætlanin er at skipa fyri einum tiltakið, har dagrøktarar saman við børnunum, sjúkraavloysarar og leiðaranum koma saman til ymisk, ein dag um vikuna frá kl. 7.30 til kl. 12.30. Vit verða í stovuni, sum frítíðarskúlin brúkar.

Lønin er sambært sáttmála við Føroya Kommunala arbeiðsgevarafelag.

## Til Dagstovnin

Søkist ein avloysari fyri pedagog í barnsburðarfarloyvið, at byrja 6. mai 2002 til 23. desembur 2002.

Arbeiðið er í vøggustovu 20 tímar um vikuna.

Vøggustovan er normerða til 14 pláss, frá 0-2 ár, 80 pedagogtímar um vikuna og 60 hjálparfólkatímar um vikuna.

Um eingin pedagogur søkir verður hjálparfólk sett.

Lønin er sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Torgerð Hansen, tlf. 442012 lokal 10.

Skrivlig umsókn við avritum av prógvum, tilmælum v.m. skal sendast okkum áðrenn 18. apríl 2002. Bygdarráðið tekur sær rætt til frítt at velja millum umsóknirnar ellan ongan at seta.

**Dagstovnurin í Gøtu**
Boks 32
511 Gøtugjógv

## Fyristøðufólk
### til Hvíldarheimið Naina

Starvið sum fyristøðufólk á Hvíldarheiminum Naina er leyst at søkja.

Hvíldarheimið, sum er sjálvsognarstovnur, er ætlaður fólki, sum aftan á sjúku ella av øðrum grundum tørva hvíld fyri at koma fyri seg aftur.

Heimið hevur 25 seingjapláss.

Á heiminum starvast sjúkrasystrar, hjálparfólk og lækni.

**Krøv til umsøkjaran:**
- Skal hava prógv og góðkenning sum sjúkrasystir, og hollar royndir á ymiskum røktarøkjum.
- Ynskiligt er, at sjúkrasystirin hevur prógv í leiðslu, ella aðra viðkomandi útbúgving.
- Skal hava góð samstarvsevni, skal vera sjálvstøðug, kreativ og hava visiónir.

Starvið er lønt sambært sáttmála hjá Sjúkrasystrafelagi Føroya.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til fyristøðukvinnuna Katrin Dahl tlf. 311840.

Freistin fyri at søkja er fríggjadagin 19. apríl.

Umsøknin skal sendast til:

**Stýrið fyri Hvíldarheimið Naina**
**Gundadalur 7**
**100 Tórshavn**

## Dagrøktin í Leirvík

### Søkir eftir dagrøktarum

Størvini eru lønt sambært sáttmálanum ímillum FKA og FA.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til leiðaran á tlf. 443251.

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 12. apríl á miðdegi.

**Leirvíkar Kommuna**
Postboks 42
520 Leirvík

PM

## Skrivstovunæmingur

At byrja skjótast gjørligt søkja vit eftir skrivstovunæmingi.

Umsøkjarin skal hava hægri handilsskúlaprógv.

Skrivlig umsókn verður at senda til P/F Poul Michelsen, Hoyvíksvegur 74, FO-100 Tórshavn.

Eru fyrispurningar læruni viðvíkjandi verða hesir svaraðir við at venda sær til Sólrun Michelsen ella Christian Danielsen á tlf. 314650.

**P/F Poul Michelsen**

## Vælkomin á Ársmøtið hjá Heimamissiónini

6. apríl 2002 í Nesvík

| | |
|---|---|
| 9.00 | Bønarløta á loftstovuni |
| 10.00 | Panel og orðaskifti<br>Evni: Hvussu røkta lombini?<br>v/Hilmar Danielsen<br>Panel: Ingibjørn Eldevig og Jógvan Steintún og Joan Hansen |
| 12.00 | Døgurði |
| 14.00 | Frágreiðingar frá arbeiðinum<br>Formans- og arbeiðsfrágreiðing v/Bergur D. Joensen<br>Fíggjarfrágreiðing v/Thomas Dam<br>Heilsanir og orðaskifti um arbeiðið |
| 15.30 | Drekka |
| 18.00 | Nátturði |
| 19.30 | Møti v/Eivind Bech<br>Evni: Hin leitandi hirðin<br>Kór: Ungdómskórið Vox<br>Innsavnan til Heimamissiónina<br>Vitniløta |
| 21.00 | Drekka |
| 22.00 | Ungdómskvøld<br>Vitnisburður v/ Mariann D. Poulsen<br>Drama<br>LUS Worship Band leiðir lovsangin<br>Neskafé við livandi tónleiki |

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Skúlavørður

Tórshavnar kommuna søkir eftir skúlavørði til Argja skúla.

**Arbeiðið**
Arbeiðsuppgávurnar eru m.a. hesar:
- at røkja bygningar og økið uttanum skúlan
- at hava umsjón við svimjihylinum
- at gera umvælingar
- at ljós, hiti og sanitetsviðurskiftini í skúlanum eru í lagi
- at trygdarbúnaðurin virkar sambært ásettum krøvum
- at halda reint og ruddiligt inni og úti
- at hava umsjón við og samskipa reingerðina í skúlanum

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava handverkaútbúgving, duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevni.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett skjótast gjørligt. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
Gjølligari upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Marjuna Holm, skúlastjóra, tlf. 314136 ella Eivind Danielsen, byggifrøðing, tlf. 315160.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir og møguligum viðmælum skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 29. apríl 2002. Viðmerkið umsóknina: Skúlavørður.

Í Argja skúla eru 350 næmingar. Har starvast 30 lærarar.

SNARSKIVAN